**VIÐMERKINGAR**

# Er nýskipanaruppskot sambandsfloksins ávegis?

**Hergeir Nielsen**



Ein størri politiskur sjónleikur er á palli, og samgongumenn kappast um at manna leiklutir sínar.

Ein jarðbundin floksformaður í sambandsflokkinum vil vera við, at higartil er ikki eitt komma broytt í lóggávuni millum ríkispartarnar, meðan ein meira loftborin javnaðarmaður lovprísar løgmanni og hansara samráðingarevnum.

Teir tigandi - tað eru teir sum stýra samfelagnum - hava vit ikki hoyrt so nógv til.

Men vit fara fara veruliga at vóna, at teir koma at flyta okkurt komma, áðrenn leiktjøldini verða drigin fyri fyri seinastu ferð.

**Fyrsti partur**

Vit sóu menn taka land í Fámjin um dagarnar, har danski uttanríkisráðharrin og Føroya løgmaður skrivaði undir eina felags yvirlýsing um at gelda avgerðarrætt Føroya á uttanríkis- og trygdarpolitiska økinum framyvir, og løgmaður helt væl til standa.

Tað var tann tíð, tá Jansaguttarnir í Fámjin bardu ágangin niður, men soleiðis er tað ikki meir. Teir høvdu vent sær undir torvunum, vistu teir til sín aftur.

Samgongumenn halda tað vera óført, um føroyingar sleppa at vera við, tá aðrir fara at tingast um møguligar vandar um okkara leiðir einafer langt inni í framtíðini.

Føroyingar hava nú skriva seg fastar her, tí teir sleppa bara at vera við, men ikki at taka avgerð um nakað sum helst.

Aftan á eina møguliga avgerð fáa teir so at vita, at teir hava medábyrgd, tí teir vóru jú eftir egnum ynski við á fundi.

Hetta at "víðka um heimildirnar" sum landsstýrið kallar tað, eru nakrar orðablómur, sum køva tann veruleika, at danir og ES fara at reka føroyskan uttanríkis- og trygdarpolitikk framyvir.

Fyrsta Merkið okkara hekk sum tigandi vitni um tann tjóðskaparliga vesaladóm og tað stjórnarskipanarliga máttloysið, ið gjørdust okkara lutur í hesum verki.

**Annar partur**

Um nakað skil var í at góðkenna sjálvsavgerarrætt okkara, so skuldi hetta sjálvandi gerast mótvegis altjóðasamfelagnum, men so var ikki.

Tvørturímóti, so varð staðfest í Keypmannahavn, at sjálvsavgerðarrættur okkara lá undir donsku grundlógini, og tað var betri ógjørt.

Løgfrøðingar og fólkarættarsakkønir kappast nú um at siga frá, at júst hendan avmarkaða viðurkenningin av, at føroyingar hava sjálvsavgerðarrætt undir donsku grundlógini, gevur ongar sjálvstøðugar heimildir og eingi rættindi til samskifti við altjóða stovnar.

Ríkisfelagsskapurin hevur ongantíð verið sterkari enn nú, sigur formaður sambandsfloksins, og tað kann tað vera nakað um.

Fyri góðum ári síðan vóru tær radikalu sjálvstýriskreftirnar í samgonguni ávaraðar móti, at lata arnarbøguna sleppa at klekja "svørð til svangan fund," men har var tíverri talað fyri deyvum oyrum.

Tá lógin um uttanríkispolitiskar heimildir og yvirtøkulógin, saman við einari nýggjari stjórnarskipan eru samtyktar á tingi, heldur sambandsflokkurin, at nýskipanaruppskotið er endaliga sett í verk, og tað hevur hann rætt í.

Tá hava teir lagað Garðin um ríkiseindina, so sum teir lovaðu veljarum sínum í samgonguskjalinum.

Hóast sambandsformaðurin sigur, at eingin einstakur persónur, ella einstakur flokkur, hevur æruna av hesum "frambrotum," so er tað ikki heilt burturvið, um onkur gipsfigururin verður stoyptur av teimum radikalu í fólkaflokkinum - sum eina áminning - um ikki annað.

Vónbrot okkara er stórt, tað skal sigast.

**Triði partur**

Triði parturin er eisini ein sorgarleikur, har ein heilur flogvøllur kemur rekandi inn í stjórnarskipanarligu viðurskifti okkara.

Har er avtalað, at vit skulu tøma Íleggingargrunnin til at útbyggja ein flogvøll, sum ikki kemur at nøkta verandi og so slett ikki framtíðartørvin hjá okkara samfelag.

Vit fáa framvegis ein vánaligan flogvøll, og harafturat fáa vit ein tóman Íleggingargrunn.

Stuttskygdar loysnir eru altíð vánaligar loysnir, og hendan ber av.

Kappingarføri okkara í altjóðagerðini fær ein mønustingin í hesum afturstigi, sum fer at forða fyri, at vit fáa avgreitt farmaflogfør og størri ferðafólkaflogfør í allari framtíð.

**Lógaruppskotið**

Bretski kongurin, Johan uttan land, skrivaði søgu, tá hann í 1215 undirskrivaði Magna Carta, hándfestningin, sum tók alt valdið frá sær sjálvum.

Løgmaður okkara ger nakað tað sama 800 ár seinni.

Um vit fáa eitt lógaruppskot á tingborð, har nakar møguleiki er at broyta tilgongdina vita vit ikki, men vit vóna tað.

Vit vóna ma., at vit undir viðgerðini av hesum málum fáa inn nakrar broytingar um, at sjálvsavgerðarrætturin skal fráboðast altjóðasamfelagnum, soleiðis at hann fær eitt veruligt virði í fólkarættinum.

# Er løgmaður drigin uppá tráð?

**Høgni Hoydal**



**Fámjinsskjal. Yvirlýsing um sjálvsavgerðarætt og yvirtøkulóg. Lóg um uttanríkispolitiskar heimildir. Trý mál verða í skundi trýst ígjøgnum innanfyri sera avmarkað tíðarskeið. Orsøkin er, at danska stjórnin vil hava hesi mál avgreidd, áðrenn fólkaatkvøða verður í Danmark um ES-grundlógina.**

Einaferð var vanligt at leggja Tjóðveldisflokkin undir proklamasjónspolitikk og at vilja fremja loysingina á einum A4-arki.

Men tess meira kemur undan kavi, tess meira bendir á, at undirskrivingin av felagslýsingum millum Føroyar og Danmark er berur proklamasjónspolitikkur. Spurningurin er, um nakað veruliga er nýtt, ella um hetta bert er nýtt samband á einum A4-arki.

**Sjálvsavgerðarrættur parkeraður**

Løgmaður boðaði frá mánadagin, at nú varð sjálvsavgerðarrætturin hjá føroysku tjóðini viðurkendur og allar forðingar ruddaðar av vegnum í sjálvstýrismálinum.

Sjálvur úttalaði eg meg sera positivt mótvegis hesum. Men sambært serfrøðingum, er ikki talan um, at veruligur sjálvsavgerðarrættur føroyinga er viðurkendur. Danska stjórnin og landsstýrið hava ikki avtalað at fráboða nakra viðurkenning av føroysku tjóðini til altjóða stovnar. Tá er lítið vunnið, tí tá verður sjálvsavgerðarrætturin parkeraður inni í danska ríkinum og undir donsku fatanini av grundlógini.

Tað er átaluvert, at løgmaður skrivar undir og boðar okkum øllum frá stórbroytingum, um landsstýrið ikki hevur ráðført seg við nakran altjóða serfrøðing á økinum.

**Avgreiðast áðrenn fólkaatkvøðuna í Danmark**

Bæði løgmaður sjálvur og Jenis av Rana hava gjørt vart við, at Anders Fogh Rasmussen hevur dugað sera væl og verið snildur mótvegis Føroyum.

Tað er púra rætt. Onkusvegna hevur hann drigið løgmann uppá tráð til tess at fáa hann at skriva undir yvirlýsingar og at fremja mál í stórum skundi.

Vit gloyma jú altíð í Føroyum, at sjálvandi hevur danska stjórnin síni áhugamál at røkja og hevur sjálvsagt eina ætlan fyri at varðveita danska eindarríkið við teimum stóru broytingum, sum henda í Evropa og í heiminum í dag. Onki løgið er í tí.

Endamálið hjá Anders Fogh Rasmussen og donsku stjórnini ar sjálvsagt at fáa frið fyri føroyingum og at gera eina heimastýrisskipan í nýggjum hami, áðrenn danska fólkaatkvøðan um ES-grundlógina verður í september.

Tey hava heft seg við, at fullveldiskreftirnar í Føroyum og Grønlandi strongja á, nú Danmark leggur fleiri og fleiri mál til ES at umsita. Stjórnin hevur heft seg við, at í Føroyum hava bæði Tjóðveldisflokkurin, Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin boðað frá, at vit eiga at taka yvir uttanríkismál, verjumál, gjaldoyramál og rættarmál, tá ið Danmark leggur avgerðarrætt til ES í hesum málum.

Tí er málið, at fáa gjørt onkra skipan, ið kann varðveita danska eindarríkið í hesi gongdini. Tað er ætlanin hjá donsku stjórnini við yvirtøkulógini og yvirlýsingunum. Har verður jú sagt, at vit kunnu yvirtaka, men ikki tey málini, ið Danmark leggur til ES at umsita.

Harafturat verður so gjørd ein lóg um uttanríkispolitiskar heimildir. Føroyar og Grønland skulu kunna gera sáttmálar við onnur lond sum "Kongeriget Danmark forsåvidt angår Færøerne og Grønland". Og Danmark skal framvegis góðkenna alt — bæði fyri, eftir og undir samráðingunum.

Við hesum amboðum vil Danmark tryggja sær, at danska ríkið ikki fer sundur í ES-gongdini.

**Alt verður skrumblað ígjøgnum nú**

Herfyri boðaði løgmaður frá at landsstýrið kundi ikki góðtaka, at grønlendska lógin um uttanríkispolitiskar heimildir varð løgd fram á Fólkatingi, áðrenn ein semja varð funnin millum Føroyar og Danmark um føroysku uttanríkisheimildirnar.

Breið semja er um í Føroyum, at grønlendska lógin er eitt afturstig, og at tað verður trupult at fáa aðra loysn fyri Føroyar, um grønlendska lógin verður samtykt.

Kortini er grønlendska lógin nú sett á dagsskránna í Fólkatinginum til fyrstu viðgerð 21. apríl.

So er spurningurin, um løgmaður eisini hevur gjørt onkra avtalu í hesum málinum, og at ein loysn fyri Føroyar skal skrumblast ígjøgnum nú, innan summarið kemur.

Ongi av hesum málum hava fingið nakra veruliga politiska viðgerð í Føroyum. Løgmaður tykist ikki at hava givið sær far um avleiðingarnar frameftir ella at hava sett sær nøkur mál fyri víðari gongdini. Tí má Løgtingið nú taka sær um reiggj og fáa lýst veruligu avleiðingarnar fyri framtíðarstøðu Føroya í síni heild.